## DAGSINS MEINING

# Vantandi virðing fyri sálarliga sjúkum

Í gjár varð ein psykiatrisk ráðstevna sett í Norðurlandahúsinum. Evnið er »familjan - ein møguleiki ella forðan«. Tað er at fegnast um, at slík evni verða tikin upp og viðgjørd á ráðstevnum. Serliga nú, og her á klettunum, tí júst her er støðan vánalig. Fyri ikki at siga ótolandi.

Ígjør kom fram, at tað resta meiri enn 40 búplásss - kømur ella íbúðir - til sálarliga sjúk. Peningur varð settur av til at kanna støðuna og hvussu spurningurin kann loysast, hóast málið eigur at vera at koma ígongd sum skjótast at útvega sálarliga sjúkum bústaðir.

Harafturat kemur, at sálarliga sjúk kunnu ikki fáa ta neyðugu hjálpina og tann neyðuga stuðulin, tá tey verða skrivað út á Landssjúkrahúsinum. Sama dag sum ráðstevnan varð sett, hevði Dimma eina grein um, hvussu trupul støðan er hjá eini familju, sum varar av einum sálarliga sjúkum manni.

Í somu grein verður sagt, at psykiatriska deild á Landssjúkrahúsinum er eitt parkeringspláss, samstundis sum yvirlæknin staðfestir: -Vit eru mangan í tí støðu, at vit vita ikki, hvat vit skulu gera við fólk. Tey hópa seg upp her á staðnum, og vit mugu royna at fáa tey út onkursvegna. Vit mugu royna, um tað ikki gongur betri hesaferð«!

Umrødda støðan er ikki í einum til afturs komnum landi, men í Føroyum í tí Harrans ári 2001! Hetta er einki annað enn skomm. Stór skomm. Støðan vísir eina vantandi líkasælu og virðing fyri teimum sálarliga sjúku og familjum teirra. Ein støða, sum er ikki er í samljóð við hugsjónina um vælferðarsamfelagið.

Støðan er ikki íkomin knappliga. Myndugleikarnir hava vitað, hvussu ring støðan er, men tað er harmiligt, at meiri ljós ikki er varpað á málið fyrr. Vónandi kann ráðstevnan, og tann økta tilvitanin um málið, gera sítt til, at løgting og landsstýrið seta neyðugu játtanirnar til økið á komandi fíggjarlóg. Umberingin, at vit hava ikki ráð, dugur ikki, tí júst nú kunnu vit staðfesta, at danska stjórnin lækkar blokkstuðulin 350 milliónir eftir ynski landsstýrisins!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Um at lúgva

**Heri Mohr**



Í skjótt 4 ár er júkað á okkum, at stuðulsveitingin (blokkurin) úr ríkiskassanum, væl og virðiliga markað til heilsuverkið, almannaverkið og skúlaverkið, er orsøkin til, at tað føroyska samfelagið fór í fillur fyri 9 árum síðan, og at vit fara at vera verandi í fillum, um blokkskipanin ikki verður beind av vegnum ongantíð ov skjótt.

Tað hevur ikki staðið á at prógva, hvussu neyðugt hetta er, um okkara lívsfrælsi skal vera lív lagað og fuglurin Føniks fjøtraður og illa trevsaður kann sleppa úr fangabúri.

Sitandi landsstýri við táverandi, fyrrverandi og núverandi landsstýrismonnum hevur brúkt stórt tal av skattaborgaranna peningi til eina hetzferð, sum ikki hevur sín líka í Føroya søgu.

Men lat tað nú fara, verri er

1) at landsstýrið ikki við einum orði hevur greitt føroya fólki frá sakliga og objektivt, hvat blokkurin sambært lógum og viðtøkum, sum løgtingið hevur staðfest, og sum landsstýrið hevur sett í gildi, er ætlaður til. Skjøl um sundurliðing av blokkinum eru til skjals,
2) at løgtingið onki aðalorðaskifti hevur havt um niðurskurð og avtøku av blokkinum, og
3) at tað nógva av tí um blokkin, sum landsstýrið í skrift og talu so at siga hevur heilavaskað okkum við, má haldast at vera lítið eftirfarandi og í fleiri førum beinleiðis ósatt ella villeiðandi.

Fyri at undirbyggja pástandin undir petti 3 kunnu vit t.d. vísa til bóklingin »Frá heimastýri til fullveldi«, sum landsstýrið einaferð í fjør lat prenta í 16500 eintøkum, ella var tað kanska fyrraárið, lingurin er ikki dagfestur.

Niðast á síðu 23 er tilskilað: »Sum er senda sjúkrahúsini í Føroyum sjúklingar til Danmarkar í sambandi við ymiskar serviðgerðir. Hvussu við hesum rættindum, um Føroyar fara úr ríkinum? Hetta eru ikki tænastur, sum føroyingar fáa ókeypis. Føroysku sjúkrahúsini rinda fullan prís fyri bæði uppihald og viðgerð. Tí verður neyvan nøkur broyting á hesum øki«.

Til hetta er at siga, at fyri 1. januar 1988 var ongin játtan á løgtingsins fíggjarlóg til Ríkishospitalið, men frá 1988 at rokna kom blokkskipanin lutvíst í gildi, og tá varð upphæddin, sum Ríkishospitalið skuldi hava fyri sjúklingaviðgerð úr Føroyum, tikin við á løgtingsins fíggjarlóg, av tí at landskassans inntøkur til nevndu útreiðslur vóru (og eru) í blokkinum. Í 1988 við 22 milliónum og í ár við 37,5 milliónum.

Um landsstýrið ikki kann afturvísa og staðfesta, at tað, sum her er skrivað, er ósatt, kann føroya fólk av góðum grundum fara at ivast í trúvirði hjá teimum, ið hava skrivað umrødda bókling, og í hvussu stórum álvara hetta, at tað »er neyðugt, at fólk nágreiniliga vita, hvat hetta snýr seg um« (síðu 5) skal takast.

Á síðu 26 er tilskilað: »Blokkstuðulin er nú knappar 950 milliónir. Av hesum eru farnu árini millum 300 og 400 milliónir brúktar til rakstur av tí føroyska samfelagnum«. Og »Í ár 2000 verður minni enn ein triðingur av tí danska stuðlinum brúktur í samfelagnum. Restin fer til samansparing, sum skal nýtast, um búskapurin verður fyri afturgongd«.

Eisini her mugu vit halda okkum til tær lógir og viðtøkur (skjøl), sum blokkurin hevur støði í, og um landsstýrið ikki kann afturvísa, at blokkurin er ætlaður og greitt markaður til heilsuverkið, almannaverkið og skúlaverkið og onki annað, og at ongin lógarheimild er at brúka 2/3 av blokkinum (600 milliónir) til samansparing, hevur tað eisini í hesum føri ein trupulleika av trúvirðinum mótvegis føroya fólki.

Kendi franski aðalmaðurin og humanisturin Michel de Montaigne (1533-1592) skrivar einastaðni í sínum Essays um at avsanna lygnir og um lygnarar (í danskari týðing):

»Det er en grim last at lyve, en last som en af de gamle beskriver som noget virkelig skamfuldt, når han siger, at det er vidnesbyrd om foragt for Gud og samtidig om frygt for menneskene… Det er umuligt at give tydeligere billede af, hvor rædselsfuld og umoralsk løgn er… Vi kommunikerer ene og alene ved hjælp af ord, og den der forfalsker ordet forråder samfundet. Ordet er det eneste redskab, vi har til at meddele vore ønsker og tanker, det er sjælens tolk. Hvis det svigter os, har vi ikke mere hold på hinanden, så kender vi ikke mere hinanden. Hvis det fører os bag lyset, bryder det alle forbindelser og kapper alle de bånd, der holder samfundet sammen… At lyve er virkelig en hæslig vane. Det eneste som gør os til mennesker og som knytter os sammen er ordet… Hvis løgn ligesom sandhed kun havde ét ansigt, ville vi være bedre stillet. Så ville vi nemlig anse det modsatte af hvad løgneren siger for rigtigt. Men sandhedens skyggeside har tusindvis af ansigter, og dens virkefelt er uendeligt«.

Lítil uggi er tað kanska at vita, at nevndu »skyggesider« kunnu liggja í lítlari fliðuskel, og sum kunnugt tolir hon lítið meira enn eina sápubløru, áðrenn hon søkkur, uttan mun til um floytt verður eftir ánna Thames ella Hoydalsá.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Royn og spæl golf

Ein tann skjótast vaksandi ítróttargreinin í Evropa í løtuni er golfítróttin.

Eisini í Føroyum verður henda ítrótt íðkað. Tað er Tórshavnar Golfklubbi, ið hevur eina golfbreyt við 9 holum á bønum við Hoyvíksgarð á Vatnaskørðum norðan fyri Havnina.

Við tað, at klubbin lænir øki frá bóndanum, ber ikki til at spæla golf um summarið. Men nú er bóndin liðugur at hoyggja, og komandi vikuskiftið verður aftur farð út á breytina at spæla golf.

Í hesum sambandi skipar Tórshavnar Golfklubbi fyri »opnari breyt« leygardagin 1. september frá kl. 10.

Henda dagin kunnu øll, ið hava áhuga at royna at sláa ein av teimum smáu bóltunum, koma niðan á Vatnaskarðar og royna seg.

Til staðar verða royndir limir, sum læna útgerð til áhugað og leggja teimum lag á.

Tað kann vera eitt sindur trupult at raka bóltin í byrjanini, men nógv eru fallin fyri ítróttini tá tey fyrst hava roynt at raka bóltin rætt eina ferð.

Í sambandi við tiltakið verður kaffi at fáa, og greitt verður eisini frá ætlanini hjá klubbanum at gera sína egnu golfbreyt á økinum millum Hoyvíksgarð og útstykkingina Inni á Gøtu.

Soleiðis kemur tú til Vatnaskarðar: Koyr niðan eftir Sundsvegnum. Aftan á brúnna um Hoydalsá fer vegurin í tvey. Tak vegin til høgru. Komin framvið bóndagarðinum ert tú á økinum hjá Tórshavnar Golfklubba.

# Youth Alive Band Australia aftur til Føroya í ár!!!

Í oktober sísta ár vóru YOUTH ALIVE BAND AUSTRALIA á vitjam í Føroymu og høvdu tey eina sera væleyðna konsert í Ítróttarhøllini í Runavík,nú hevur tað so eyðnast ADORE MUSIC at fáa tey aftur til Føroya 22 — 24 okt.

Tann 23 okt. verður tann stóra konsertin vi bólkinum í Ítróttarhøllini í Runavík.

Ætlanin er eisini at skipa fyri øðrum tiltøkum í samband við vitjanina, meiri vitjanina seinni.

### Stór Ungdómsráðstevna í januar 2002

Í døgunum 17 — 20 skipar ADORE MUSIC fyri stórari landsumfatandi ungdómsráðstevnu, staði fyri ráðstevnuna er ikki avgjørt enn, men høvuðstalari á stevnini verður leiðarin fyri NY GENERATION í svøríki, MAGNUS PERSSON, hann er ein sera karismatiskur og livandi talari. Á stevnini verða fleiri sokallaði »seminar« um dagin meðan kvøldini verða sett av til festmøtir við nógvum sangi og tónleiki. Meiri um stevnuna og aðrar lutakarar seinni.

### Adore Summer festival 2002

Um alt gongur eftir ætlan skipar ADORE MUSIC tann 13 — 16 juni 2002 fyri tí størsta kristna tónleikafestivali sum hevur verið í Føroyum, ADORE SUMMER FESTIVAL 2002. Fyrireikingarnar eru í gongd og fleiri avtalur eru longu gjørdar við útlendskar bólkar, bæði úr USA og EUROPA. Tað er ov tíðliga at almannakunngerða nøvnini men tað eru nøvn sum borga fyri góðsku bæði tónleikaliga og tá ið tað kemur til boðskapin, har verður alt frá lovsangi, rock til dance/techno.

Eisini koma fleiri Føroyskir bólkar at luttaka.

*Framhald av s. 22*

Meginlands mentan til fjarskotnar oyggjabúgvar í bretsku oyggjunum og Skandinavia, so hesi í veruleika uppgeva frælsi og fullveldi sítt til frama fyri ídnaðarútbygging í suður Europa, Turkínum og norður Afrika. Ongin greiður fyrimunur er fyri protstantisku londini uttan kanska Týskland við sterka búskapi sínum enn. Men góð arbeiðspláss verða í Brússel til hálvlærd lesandi frá hægri lærustovnum. Fáa EU stovnarnir veruligt vald, tingið verður lóggevandi, er onki í vegin fyri, at suður og miðeuropeisku londini leggja seg útí øll innlendis viðurskifti í limalondunum, serliga av týdningi fyri vestur, norður londini. Er longu við at henda. Tillaging fyri hesi merkir bara ein veg, tillaging til møguleikarnar hjá katólaku menningarlondunum í suður Europa.

**Útsøla**

**Útsølan byrjar leygardagin 1/9 kl. 10.00 við nógvum góðum tilboðum av meturvørum**

**Meðan útsølan er lata vit 10% í avsláttri av øllum PFAFF og HUSQVARNA seymimaskinum**

**SEYMISKRÍNIÐ**

Dr. Jakobsensgøta 16 • Box 320
110 Tórshavn • Tel 31 40 05

Nú summarið er farið at halla, er aftur tíð at hugsa um at venja. Komið inn í Yndi, tí vit eru væl fyri at taka ímóti tykkum. Vit kunnu bjóða ymisk sløg av venjingum, so sum aerobic, spinning, stepp & styrki, trimmara og so sjálvandi eisini ballett.

**AEROBIC**

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 17:15 – 18:30 Aerobic - vand Tórhalla | 09:00 – 10:00 Morgunfimleikur Øll/ Elsa Maria | 17:15 – 18:15 Low - kvinnur Oddvør | 15:00 – 16:00 Trimmari - øll Tórhalla |
| 18:30 – 19:30 Trimmari-øll Oddvør | | 18:30 – 20:00 Trimm & Spinn - øll Maria | 18:00 – 19:00 Aerobic - byrjarar-øll Maud / Elsa Maria |
| 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Øll/ Ingrid | 19:30 – 20:00 Aerobic - byrjara/øll Maud/ Elsa Maria | 19:00 – 20:15 Stepp & Styrki - øll Joan | 19:00 – 20:00 Trimmari - øll Maud / Elsa Maria |
| | | | 20:00 – 21:00 Ryggfimleikur Anna Maria |

**Byrja 3. sept.**

**Enda 9. dec.**

**Trimm & Spinn**

er serliga ætla teimum, ið vilja sleppa av við fita og at stramma seg upp aftur. Hetta er eitt lið, ið øll kunnu vera við.

**SPINNING**

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 18:45 – 19:45 Spinn - øll Tórhalla | 17:00 – 18:00 Spinn øll Tórhalla | | 16:00 - 17:00 Spinn øll Tórhalla |
| 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn | | 18:30 – 20:00 Trimm & Spinn-øll Maria | |

Broytingar kunnu koma fyri

**Rygghold**

Hevur tú trupulleikar við rygginum, er hetta nakað fyri teg. Undirvísari er Anna Maria Joensen, fysioterapeutur

**Kostnaður fyri alt skeiðið:**

1 tíma um vikuna 470,- *
2 tímar um vikuna 770,- *
3 tímar um vikuna 990,-

* skúlanæmingar 20% avsláttur

**Ballett**

| Týsdag | Hósdag |
|---|---|
| 16:00 – 17:00 Ballet 9-11 ár Eyð & Durita | 16:00 – 17:00 Ballet 12-14 ár Eyð & Durita |
| 17:00 – 18:00 Ballet 6-8 ár Eyð & Durita | |
| 18:00 – 19:00 15 ár og eldri Elsa Maria | |

Kostnaður fyri alt skeiðið:
6-12 ár 450,-
13 ár og eldri 490,-
eina ferð um vikuna

Tilmelding fer fram við at ringja til okkum, Elsa Maria tlf. 310025 og 312868 og í Yndi tlf. 311311.
Vit eru eisini at hitta í hølum okkara yvir við Strond, leygardagin 1. september, frá kl. 15.00-16.00, har tit eru vælkomin inn á gólvið.
*Gjaldast skal við fyrsta venjingartíma, annars er kostnaðurin 50,- kr fyri hvønn tíma.*

**Morgunfimleikur**

Leggið til merkis! Nú er møguleiki at gera morgunfimleik, har øll kunnu luttaka!



*Hugsar tú um tína vælveru, so kom út í*

**YNDI**

*v/ Elsu Mariu Bærentsen*

Yviri við Strond 21
FO-100 Tórshavn
e-mail: yndi@post.olivant.fo